

*Ung og eldri*



*Øll saman í nýumvældu dansistovuni í Sumba*

gjørt við at elsti luttakari okkara, hin 87-ára gamli Tórir Thomsen. leggur høkjuna og skipar "Streingirs Vísu".

Sumbingar eiga so tørn og taka "Kong Sverke". Vit skiftast siðiliga aðruhvørja ferð nakað soleiðis, har okkara høvuðsviðførið eru "Kópakvæðið" og "Leirvíks-Páll". Her innímillum flætta sumbingar "Jallgrímskvæðið", "Frísarnarnir, ið búðu á sinni" og "Frem igen". Hetta seinasta kvøðið einans av kvinnum – sum tær komu einastandandi væl frá. Frísarnar skipaði ung sumbiargenta við klárari og góðari rødd, har alt dansifólkið tók væl undir.

Nú vóru vit heit og væl fyri at taka ímóti sjálvum hæddarpunktinum í fyrra parti: nú fóru sumbingar undir "Sigmundsvísuna":

*"Blandt Hedenolds de Nordens gjæve Helte*
*og Sigmund var den ædle Færøersmand,*
*af alle dem som spændte Sværd ved Bælte,*
*i Kampen ingen djærvere end han."*

Nú kom gamla timbur-dansigólvið rættiliga til sín rætt. Vit sveiggjaðu bæði við innihaldi og gólvi. Tað var sum vóru vit øll ein liður í aldargamla, felagsføroyska dansiringinum, ið lyfti okkum upp í hægstu dansisælu! Hetta duga sumbingar best av øllum!

.........

Á midnátt verða vit boðin í trý hús kring dansistovuna til smurt breyð við øllum góðum. Í onkrum húsi ljóma gamlar kærleiksvísur eina løtu aftaná – sum 80 ára gomul kvinna sjarmerandi syngur fyri. So oman aftur í dansistovuna, har annað umfar byrjar.

Framvegis eru fleiri ungfólk við. Gleðiligt at síggja, hvussu sumbingar halda teim ungu til at varðveita forna dýrgrip teirra: serstaka dansilagi, ið er lívligt og fangandi. Góðu røddirnar ganga upp í eina hægri eind við teirra eyðkenda og livandi stevi.

Tórir hevur aftur blaka høkjuna og skipar bæði "Stærke Tidrik" og "Vaagen", ið sumbingar taka væl undir við. Teir koma við nøkrum stuttum og góðum sum "Ved Kristiansand" og "Huldurímu". Eysturoyar dansifelag við sjálvum formanninum Kathrinu Hansen á odda spæla trumfin út, ið eitur "Norska Løva".

Sumbingar svara aftur nakað aftaná við seinna hæddarpunktinum, ið gjørdist "Brestis Kvæði", har teir enn einaferð draga okkum beint inní bardagan, inn í sjálvt kvæðainnihaldið. Á ein slíkan hátt, at tú nærum skalt til at skáka tær undan tá ið høggini falla har úti í Dimun, Brestir og Beinir øðrumegin og liðini hjá Tróndi og Bjarna hinumegin......

## Fráferð

Klokkan uml.fýra kemur bussur eftir fólki, ið skal til Vágs, Tvøroyri – ella umborð á Smyril at fáa sær eina hvíld áðrenn fráferðína tíðliga á morgni.

Men nøkur taka av hjartaliga blíðskapinum og gista hjá hesum fróðu og mentaðu fólkum. Sunnudagurin fer við hvíld, kirkjugond og vitjan hjá vinfólki.

Tá ið nýggi Smyril leggur aðru ferð frá Drelnesi hendan sunnudagin í november, ber hann enn eina last um fjørðin av takksomum vælnøgdum dansifólki, ið frøðist um eitt stórt dansi-upplivilsi og blíðskap í serklassa, frá Dansifelagnum í Sumba og sumbingum annars. Aftaná tílíkan túr skilur tú enn betri, hví sumbingar fyri nøkrum árum síðan vunnu europeiska heiðursløn fyri at varðveita gamlan mentanararv á besta hátt.